# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Jóna Thomsen, Tórshavn:

## 35 ára starvsdag hjá Barnatannrøktini



**10. februar 2005 hevði Jóna Thomsen í Havn 35 ára starvsdag sum klinikkassistentur hjá Barnatannrøktini hjá Tórshavnar kommunu**

Jóna byrjaði sum 20 ára gomul tann 10. februar 1970 hjá Skúlatannlæknanum, sum tá helt til í niðastu hædd í Tórshavnar Kommunuskúla, har Erling Simonsen var tannlæknastjóri.

Síðan 1976 hevur Barnatannrøktin hjá Tórshavnar kommunu hildið til í Tórsgøtu 23.

Í dag er Sigrid Arge tannlæknastjóri á stovninum.

Jóna sigur, at Barnatannrøktin er eitt gott arbeiðspláss, og hon trívist sera væl í starvinum.

Í sambandi við starvsdagin komu borgarstjórin í Tórshavnar kommunu Heðin Mortensen og trivnaðarstjórin Gunnleyg Durhuus við blómum, og hon fekk eisini blómur frá starvsfeløgunum.

## Minningarorð um systur mína Maud

**24. juni 1972 – 30. januar 2005**



Tað er sera tungt fyri aðru ferð at
skriva minningarorð um eina systur.
Ikki tvey ár aftaná Synnøvu fór tú nú mín
kæra systir Maud.

Eisini tú Maud doyði so brádliga.
Vit vistu, tú var sjúk, men vónaðu at tú
fór ar fáa ta hjálp, sum var neyðug fyri
at tú kundi fáa tað gott. Tú hevði sjálv
so gott mót og var sera tolin.

Hóast tað vóru 8 ár ímillum okkum,
vóru vit ógvuliga góðar systrar og
søgdu hvørju aðrari alt.
Tað er so einsligt nú, tit báðar eru farnar.

Eg hugsi nógv um tykkum, mammu og babba,
sum hava mist tvær døtur so ungar.

Góða Maud, takk fyri alt tú var fyri okkum.

Hvíl í friði

**Joan**

## Skósølan við Gøtugjógv í nýggjum handilshølum



*Terji Hansen í nýggju handilshølunum hjá Skósøluni við Gøtugjógv*
*Mynd: Hjørdis Gregersen*

Mikudagin 9. februar 2005 lat Skósølan við Gøtugjógv upp nýggjum handil.

Handilin er fluttur í størri hølir norðan fyri kirkjuna við Gøtugjógv. Gólvvíddin í handlinum er nú 53 fermetrar umfram goymsluhølir.

Skósølan við Gøtugjógv hevur skjótt 60 ár á baki. Tað var Jákup Hansen, skósmiður, sum stovnaði fyritøkuna í 1946. Í dag er tað abbasonurin, Terji Hansen, ið eigur og rekur handilin.

Umframt vanligar skógvar selur Skósølan eisini t.d. frítíðarklæðir, gaggir, fótbóltar og aðra ítróttarútgerð.



## Litmyndir av brúðarpørum í Sosialurin

Vikuskiftis

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**



### Silvurbrúdleyp

15. februar høvdu hjúnini Lis og Zacharias Zachariassen í Norðragøtu verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 19. februar, har opið hús verður frá kl. 16 til 22.

Í dag, 16. februar, hava hjúnini Gunnleyg og Jóanes Norðberg í Vági verið gift í 25 ár. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Øravík kl. 18.00.

### 80 ára føðingardagur

Hósdagin 17. februar verður Sofía úr Gørðum, Skopun, 80 ár.

Dagurin verður hildin heima fríggjadagin 18. febr. frá kl. 19.00.

### Dagurin

**16. februar. Juliana**, deyð umleið ár 300. Vildi ikki giftast heidna trúlovaða sínum og varð tikin av døgum. Er eisini navn á tveimum øðrum halgikvinnum. Giljanna er føroyski navanformurin.

*Juliana* er rómverskt ættarnavn.